Millum undirritaðu

**Føroyar Pedagogfelag**
**Tungugøta 1**
**100 Tórshavn**

og

**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið**
**R.C. Effersøesgøta 30**
**100 Tórshavn**

er gjørd henda

# SEMJA

**í Fasta Gerðarrættarmáli nr. 1/2014:**

Pedagogfelagið tekur aftur kæruritið, sum varð latið Fasta Gerðarrætti tann 4. mars 2014, hareftir Pedagogfelagið setti krav fram um, at KAF skuldi viðurkenna, at starvsaldurin hjá námsfrøðingum á dagstovnum við starvssetan skal verða roknaður við grundarlagi í tí lønartalvuni, sum er galdandi við starvssetan.

Í hesum sambandi fastheldur KAF, at starvsaldurin hjá námsfrøðingum á dagstovni í sambandi við starvssetan altíð eigur at verða roknaður við grundarlagi í tí lønartalvuni (teimum lønarstigunum), sum vóru galdandi, tá námsfrøðingurin fyrstu ferð varð settur í starv eftir lokna útbúgving.

Partarnir semjast tó við hesum um, at námsfrøðingar á dagstovni, sum upprunaliga vórðu innplaseraðir við grundarlagi í lønartalvuni, sum var galdandi, tá námsfrøðingarnir vórðu settir í starv fyrstu ferð eftir lokna útbúgving (tvs. námsfrøðingar á dagstovnum, sum upprunaliga byrjaðu á lønarstigi 9 ella 10), og sum framvegis ikki vóru komnir á endastig tann 1. januar 2013, verða fluttir, soleiðis at starvsaldur teirra frá 1. januar 2013 at roknað og frameftir verður roknaður við grundarlagi í tí lønartalvuni, sum hevur verið galdandi síðani 1. oktober 2007, og sum (við seinni lønarhækkingum) framvegis er galdandi (tvs. sum um at teir upprunaliga byrjaðu á lønarstigi 11). Møgulig løn til góðar frá

tíðarskeiðnum frá 1. januar 2013 til nú verður útgoldin námsfrøðingunum saman við næstu lønarútgjaldingini.

KAF váttar somuleiðis, at KAF fer at geva stovnunum, sum eru fevndir av sáttmálanum millum Pedagogfelagið og KAF, boð um, at starvsaldurin hjá námsfrøðingunum á dagstovnum hjá kommununum í framtíðini skal roknast við grundarlagi í lønartalvuni frá 1. oktober 2007 (tvs. allir skulu byrja á lønarstig 11).

Hendan semjan er treytað av, at Pedagogfelagið ikki vegna limir sínar setir fram endurgjaldskrav vegna tað, at starvsaldurin áður hevur verið roknaður við grundarlagi í tí lønartalvuni, sum var galdandi, tá námsfrøðingurin fyrstu ferð varð settur í starv eftir lokna útbúgving.

Hvør partur ber ½ av samlaðu útreiðslunum til Fasta Gerðarrættin vegna málið, og hvør partur ber annars sjálvur møguligar aðrar útreiðslur, herundir útreiðslur til egnan advokat.

Hetta semjuskjal verður undirskrivað í tveimum eintøkum, og fær hvør partur eitt eintak.

Tórshavn, tann 20/11 - 2015

**Vegna**
**Pedagogfelag Føroya:**

Jógvan Philbrow, formaður

Tórshavn, tann / - 2015

**Vegna**
**Kommunala Arbeiðsgevarafelagið:**

Heðin Mortensen, formaður